betri
DEILDIN

# LEIKSKRÁ

30. apríl 2023

SKRÁ NR. 4




JAN Ó. ELLINGSGAARD NR. 3

# 7. UMFAR

HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo



SVERRI EGHOLM/PORTAL.FO

# Ítróttarfelag Fuglafjarðar


Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo



**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri

# INNIHALD

Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM B68

Dómarar

Toppskjúttar eftir 6 umfør

Søgubrot 4

ÍF-sangurin



INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



BIRGIR PETERSEN

# DYSTURIN Í DAG

Vælkomin til dyst í Betri-deildini. Seinasta umfar leiktu vit við Stórá móti TB, úrslitið gjørdist ein 0-1 sigur til okkum, ein ordans arbeiðssigur, har vit skora tíðliga og halda fast til endans og eru displineraðir nokk til at kempa sigurin heim. TB gjørdi sær sjálvum eina bjarnatænastu við at fáa 2 reyð kort til stuðulsleikarar í steypakappingini, seinasta vikuskifti, og vóru tí nakað skerdir móti okkum.

Venjarin hjá okkum hevur bæði beinini á jørðini og heldur at góða gongdin er úrslit av hørðum arbeiði og stríðsvilja saman við greiðari spæliætlan. Aleksandar heldur eisini at vit eisini kundu havt fingið enn meira

burturúr og at vit hava havt nakrar støður aftrat, sum kundu koppa okkara veg, og at teir gera alt fyri at betra seg fyri hvønn dyst. Hann metir at B68-dysturin er ein tann harðasti dysturin inntil nú og væntar stóra mótstøðu, tí teir hava eitt gott lið, men at okkara menn fara at leggja sína seinastu orku í hendan dystin eftir eina sera strævna skrá við 6 dystum uppá 2 vikur.

Í dag taka vit ímóti B68, sum fingu ein ordans avsmurning frá KÍ mikukvøldið, so teir eru óiva sera uppsettir uppá at fáa vaska tapið av sær, sum skjótast. Teir hava enn ikki vunnið nakran dyst í ár, so tað sær ikki út til at teir hava fingið tingini ordiliga til at fungera.

Í dag verður spennandi at síggja hvussu dysturin fer at verða leiktur, bæði liðini noyðast at leggja nógv fyri, tí vit vilja gera alt fyri at halda fast í góðu gongdini og mótstøðan í dag skal royna at berja seg upp úr botninum.

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyri á drongir**




**BÓLTASTUÐUL:**
Fuglafjarðar Havn



VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

EFTIR 2 UMFØR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 6 | 6 | 0 | 0 | 20 | 2 | +18 | 18 |
| 2 | B36 | 6 | 5 | 0 | 1 | 12 | 5 | +7 | 15 |
| 3 | HB | 6 | 4 | 2 | 0 | 15 | 3 | +12 | 14 |
| 4 | ÍF | 6 | 3 | 0 | 3 | 7 | 6 | +1 | 9 |
| 5 | Víkingur | 6 | 2 | 2 | 2 | 12 | 9 | +3 | 8 |
| 6 | 07 Vestur | 6 | 2 | 1 | 3 | 8 | 10 | -2 | 7 |
| 7 | EB/Streymur | 6 | 2 | 1 | 3 | 5 | 7 | -2 | 7 |
| 8 | TB | 6 | 1 | 1 | 4 | 4 | 18 | -14 | 4 |
| 9 | B68 | 6 | 0 | 3 | 3 | 5 | 15 | -10 | 3 |
| 10 | AB | 6 | 0 | 0 | 6 | 1 | 14 | -13 | 0 |

WWW.DYSTIR.FO

## 7. UMFAR

| | |
|---|---|
| 30.04.23 | B36 - KÍ |
| 30.04.23 | Víkingur - EB/Streymur |
| 30.04.23 | 07 Vestur - HB |
| 30.04.23 | AB - TB |
| 30.04.23 | ÍF - B68 |

## 8. UMFAR

| | |
|---|---|
| 05.05.23 | TB - B36 |
| 05.05.23 | EB/Streymur - HB |
| 05.05.23 | B68 - AB |
| 05.05.23 | 07 Vestur - Víkingur |
| 06.05.23 | KÍ - ÍF |


KES.FO
HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE
Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.
Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.
DVI
energi
INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 | | Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Elvio **Gelmini** | 2 | | Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 | | Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 | | Jóhann **Højbro** | 17 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 | | Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Karl **A. Løkin** | 6 | | Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 | | Aron **Kensson** | 20 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 8 | | Rógvi **Matras** | 21 |
| Jhon Edy **Mena** | 9 | | Elias **Lervig** | 22 |
| Jóhan **Petersen** | 10 | | Hans **Jacobsen** | 23 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 | | Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 12 | | Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 | | Sámal **Zachariassen** | 34 |

Høvuðsvenjari: **Aleksandar Jovevic**
Hjálparvenjari: **Bartal Eliasen**
Málmansvenjari: **Erling Joensen**
Fysiskur venjari: **Gudmundur Danielsen**
Fysioterapeutur: **Jónfríð Hansen**
Liðleiðari: **Rói D. Olsen**
Liðleiðari: **Heðin L. Olsen**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**

| | |
|---|---|
| Benjamin **Schubert** | 1 |
| Hjalti **Strømsten** | 4 |
| Aleksandur **Jensen** | 5 |
| Sebastian **Nielsen** | 6 |
| Gilli **Samuelsen** | 7 |
| Ragnar **Samuelsen** | 8 |
| Jørgen **Nielsen** | 9 |
| Boubacar **Dabo** | 10 |
| Bárður **Jensen** | 11 |
| Alex **Mellemgaard** | 12 |
| Karstin **Clementsen** | 14 |
| Eli **Hansen** | 15 |
| Fríði **Petersen** | 16 |
| Hjarnar **Johansen** | 19 |
| Jónas **Warner** | 20 |
| Tórður **Thomsen** | 21 |
| Hanus **Højgaard** | 22 |
| Áki **Johannesen** | 24 |
| Aron **Hansen** | 25 |
| Villiam **Klein** | 30 |
| Aidan **Liu** | 32 |
| Svend **Danielsen** | 77 |
| Mohamed **Samba** | 98 |

Høvuðsvenjari: **Jákup á Borg**
Hjálparvenjari: **André Olsen**
Málmansvenjari: **Tórður Thomsen**
Fysiskur venjari: **Allan Tungán**
Liðleiðari: **Høgni Petersen**
Liðleiðari: **Búi í Hjøllum**

**INNIHALD**

DÓMARI

Bjarki **Danielsen**

1. HJÁLPARDÓMARI

Jógvan **Breckmann**

2. HJÁLPARDÓMARI

Regin **Egholm**

4. DÓMARI

Árni B. **Petersen**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Lassin **Isaksen**

magn




Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT

løggildir grannskoðarar

**Tórshavn**
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

**Klaksvík**
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo






# INNIHALD

# TOPP 10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 8 |
| 2 | Mikkel **Dahl** (HB) | 5 |
| 3 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 4 |
| 4 | Mads **Borchers** (HB) | 3 |
| 5 | Hans Jákup **J. Lervig** (ÍF) | 3 |
| 6 | Árni **Fredriksberg** (KÍ) | 3 |
| 7 | Claes Philip **Kronberg** (KÍ) | 3 |
| 8 | Sølvi **Vatnhamar** (Víkingur) | 3 |
| 9 | Daniel **Obbekjær** (07 Vestur) | 2 |
| 10 | Jasper **Van Der Heyden** (07 Vestur) | 2 |

WWW.DYSTUR.FO

SØGUBROT 4

# Av **Sandinum** niðan **í Fløtugerði**

EFTIR: PETUR S. SIMONSEN

**Tað er heilt vist, at tað var ein avbjóðing at finna eitt hóskandi stað at leggja ein fótbóltsvøll í Fuglafirði. Tað frætta vit nærri um niðanfyri.**

Men hinvegin kunnu vit siga, at vøllurin í Fløtugerði liggur so avbera væl. – Hann er mitt í bygdini, tætt við skúlan og er eitt sjálvsagt spælipláss hjá børnum og ungum uttanfyri vanligu venjingartíðirnar. Harafturat er tað veðurgott við vøllin, og áskoðararnir hava av náttúrugivnum orsøkum framúr útsýni yvir vøllin.

Fara vit 100 ár ella meira aftur í tíðina, ja, so var ongin fótbóltsvøllur í Fuglafirði, men spælt varð á Sandinum. Og tá eiðismenn á heysti í 1939 skriva bræv til feløgini um Eysturoyarkappiningina 1939-40, verður til endans sagt: "Kampin í Fuglafirði hava vit einki ímóti at flyta vegna streymforhold, um tað er neyðugt." *(sí Søgubrot 1)*. – Ivaleyst hugsa eiðismenn meir um flóð og fjøru á Fuglafirði enn um útróðrarlíkindi í Djúpunum. Tí var flóð, ja, so var sandurin í ikki nóg stórur til at spæla ein fótbóltsdyst! (mynd 2)

**Úr fundarfrásøgnini 31. august 1955**
Í Søgubroti 2 varð nevnt, at Fuglafjarðar kommuna í 1941 og 42 játtar Ítróttarfelag Fuglafjarðar "studning til leikvøll".



*Mynd 2: Sigurð Petersen hevur tikið myndina í 1932. Myndin vísir, at sandurin er rættiliga stórur.*

Í fundarfrásøgnini 31. august 1955 hevur formaðurin, Herluf Berthelsen, rættiliga neyva frágreiðing um hvussu vøllurin í Fløtugerði gjørdist veruleiki. Niðanfyri taka vit nøkur brot burtur úr hesi frágreiðingini.
Herluf skrivar: "Sum monnum kunnugt, hava fuglfirðingar leikað fótbólt á Sandinum síðani aldarskiftið. Tá var Sandurin stórur og sløttur og góður at leika á. Av og á vóru røddir frammi um at fáa ein leikvøll á turrum lendi, tí bert kundi verða leikað, tá ið fjøra var í sjónum, og var flóðin til bága fyri mangan dyst. Í 20'unum varð talað um at gera leikvøll undir Ryggi á Kambsdali. Fyrst í 30'unum varð sett á at grava á Bjarnafløtum, og miðskeiðis í 30'unum varð sett á




*Mynd 1: Myndin vísir hvar talan hevur verið um at gera leikvøll. 1 Sandurin; 2 Undir Ryggi á Kambsdali; 3 Bjarnafløta; 4 Oyruni Vestur í Dala; 6 Fløtugerði. Økið inn frá Kaiin (5), sum varð vígd í 1949, var neyvan ætlað til fótbólt og hondbólt, men bleiv brúkt til hetta í knapt 10 ár.*

at grava á Oyruni vestur í Dal. Men onki av hesum arbeiðum kom longur enn til eina byrjan – og varð so steðgað." (mynd 1)

Á mynd 1 síggja vit støðini í Fuglafirði/Kambsdali, sum sambært fundarbókini hava verið uppá tal til at gera leikvøll. Sandurin mann hava verið brúktur sum fótbóltsvøllur – meir og minni – til í 40'num. Tá minkaði sandurin rættiliga nógv, tí tikið varð av honum til m.a. at stoypa við. Nýggj kai varð bygd í seinnu helvt

av 40'unum, og hon varð vígd í 1949, tá Smiril (II) sum fyrsta skip legði at bryggju. Smiril hevði tá eisini rutusigling til m.a. Fuglafjarðar.

Økið, sum lá inn frá sjálvari kaiini og niðan móti bakkanum og vegnum, var neyvan ætlað til vøll, men umstøðurnar gjørdu tað neyðugt og møguligt at brúka tað til hondbólt og fótbólt, tá sildatunnur, reiðskapur og annað, sum hevði við fiskivinnu at gera, ikki tók alt plássið.

Fuglfirðingar hava tí helst leikt fótbólt og hondbólt á kaiini frá seinast í 40'unum til vøllurin í Fløtugerði varð tikin í brúk í november 1956. (mynd 4, 5 og 6)
Hvussu ítøkiligar ætlanirnar hava verið at gera vøll úti á Kambsdali, á Bjarnafløtu og Vesturi í Dal er eitt sindur ógreitt. Veit Ikki annað um tað, enn tað sum stendur í fundarbókini. Har stendur: "Men onki av hesum arbeiðum kom longur enn til eina byrjan – og varð so steðgað."



*Mynd 4: Smádreingir spæla fótbóltsdyst á kaiini í 50-unum.*



*Mynd 5: Kvinnurnar spæla hondbólt á kaiini. Helst á Varmakeldu.*



*Mynd 6: Fuglfirðingar – í strípútum blusum – spæla fótbólt á kaiini. Helst er tað móti manning av skipinum, sum liggur við bryggju – einum stórum russiskum móðurskipi.*

**TRÝST HER FYRI AT LESA ALLA GREININA**

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99



BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast

TAKK FYRI STUÐULIN

**Leiðandi reiðarí**
**í norðurhøvum**




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo



# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**